# Atkomuviðirskifti og ítøkiligar ætlanir

**Leila Solmunde**
*Formaður í MBF*

Nýggjársdag bar ÙF tíðindini, at Ráðið fyri brekað hevur fingið nýggjan formann, og tillukku við valinum Barbara á Tjaldrafløtti.

Sum formaður í MBF og føddur limur í ráðnum, gleðir tað meg at vit hava fingið atkomuviðirskiftir á dagsskrá, í eina virkisætlan, sum Ráðið fyri brekað hevur gjørt. Eina ætlan sum greitt tilskilar, hvørji mál vit skulu taka upp og royna at loysa, og ikki minst hvussu vit loysa tey.

At vit, sum eru rørslutarnað í Føroyum, í áravís hava víst á, at í Føroyum eru atkomuviðurskiftini til almennar og kommunalar bygningar vánalig, og tá vit, sum umboða MBF í ráðnum vísti á hesi truplu viðurskifti, sum hesi fólk virka undir, tók ráðið fult undir við, at seta hetta málið á dagsskrá og fáa tað upp á hægsta politiska stig.

Tí er tað at gleðast um, at ein ætlan liggur á økinum, um hvussu vit kunnu loysa henda trupulleika, og at politiski myndugleikin er kunnaður um, hvussu vit vilja hava hesi viðurskiftir lógarfest sum krav, tá nýggir bygningar verða bygdir ella tá tað almenna skal út at leiga á privata marknaðinum. Mín vón er, at vit í 2006 síggja hesi viðurskiftir tryggjaði í byggi- og býarskipanarlógini, og ein eftirlitsmyndugleiki verður settur í verk, sum tryggjar at hesi krøv verða yvirhildin.

Eitt sum eg kundi hugsa mær at trivið eitt sindur í er støðan á samferðsluøkinum. Ongin ivi er um, at vit í 2006 fara at hoyra meiri um tær ætlanir sum liggja á tunnilsøkinum í Føroyum, tí beint áðrenn tingið fór til hús undan jólum, vóru ikki minni enn tríggjar tunnilsætlanir samtyktar sum langtíðarætlanir.

Í MBF fegnast vit um teir báðar tunlarnar sum hava avloyst og koma at avloysa ferjurnar, sum ikki vóru hóskandi fyri fólk við brekið. Somuleiðis er tað eitt framstig at Smyril og Teistin eru í tí atkomuliga hópinum, sum kann verða til gang fyri øll fólk, og ikki minst borgaran við breki.

Tíverri hoyra vit ikki so nógv um, hvørjar ætlanir eru á ferjusambandinum til tær smærri oyggjarnar. Eg sakni eina langtíðarætlan, har man raðfestir hvørjar ferjur skulu skiftast út í komandi árum, so vit kunnu fáa nútíðarhóskandi ferjur, sum lúka tey krøv allir borgarar hava í einum nútíðarsamfelag, sum skal verða eitt av heimsins fremstu um 10 ár.

Vit kunnu taka eitt dømi, um hvussu trupult tað er at ferðast við teimum smáu ferjunum. Um tú sum borgari í Nólsoy hevur eitt rørslubrek, og skalt yvir fjørðin til Havnar til arbeiðis, ørindir ella hvat tú nú skalt til, mást tú berast umborð á Rituna. Tað er eisini komið fyri, at fólk er heysa umborð við krana. Hetta má sigast at verða ein skelkandi uppliving at møta, og ein niðurgerðing av einum menniskja við rørslubrekið, at tú eins og farmur skal heysast umborð í eina ferju. Tá tað eru slíkar umstøður sum tú møtir, er lættari at setast aftur. At hava slíkan flutningsmøguleika í 2006, er slett ikki nøktandi fyri fólk sum búgva í hesum økinum.

Tað kundi verið hugaligt fyri íbúgvarnar í útjaðaraøkjunum at sæð eina ætlan yvir hvørjar raðfestingar politiski myndugleikin hevur gjørt sær á samferðsluøkinum, so tey sum hava trupulleika at koma fram vegna vánaliga atkomu, kundi avgjørt um tað nú er vert at seta búgv í oynni, ella um ein skal hugsa um at flyta vegna vánaligu atkomuviðurskiftini til hesar ferjur, sum í dag er einasta flutningsmøguleiki fyri hesar íbúgvar. Somuleiðis eru bussarnir hjá Bygdaleiðum ikki serliga atkomuligir. Høg trin, smala gongdir og trappur er tann veruleiki sum fólk møta tá tey koma í bussin. Hetta er ikki bert trupult fyri fólk við breki, men eisini fyri tey sum eru frísk men hava okkurt at bera, hava barnavogn o.s.fr.

Okkara vón er, at vit fara at síggja eina ætlan á samferðsluøkinum, har smáu ferjurnar og bussarnir hjá Bygdaleiðum taka atkomuviðurskiftini fyri rørslutarnað og onnur í størsta álvara og sum ein menniskjarætt. Tað sum er gott fyri fólk við breki, er eisini gott fyri onnur fólk, sum ferðast runt í samfelagnum. Tí koma ábøtur øllum til góðar.



Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður í almanna og heilsumálum sigur í Sosialinum frá 30 des. 05, at ætlanin er í 2006 at leggja eina virkisætlan fyri brekað, hesum heilsa vit vælkomnum.

Í 2006 hevur MBF 25 ár á baki, og koma vit í árinum at taka upp ymisk viðurskiftir sum vit ynskja politiska myndugleikan at fremja, so vit kunnu hava eitt samfelag sum er fyri øll. Vit síggja fram til eina virkisætlan á økinum fyri fólk við brekið, so vit vita hvussu langt er til hvørt átakið, sum skal fremjast. Við vón um eitt gott samstarv og eitt ár har borgarin í við breki kann føla at hansara viðurskiftir verða tikin við í allari samfelagsráðlegging, ynski eg øllum eitt gott nýggjár.

# Frásøgan um Lot

**Birita Lamhauge Jóansdóttir**
**Ålborg**
**Eivind O. Simonsen**
**Viby J**

Kennir tú frásøgnina um Lot? Hendan spurning setir Jenis av Rana í einum lesarabrævi í bløðunum herfyri. Boðskapurin í hesi frásøgn tykist – ífylgi Jenis – at vera, at hetta er ein søga um kærleika Guðs og samstundis er hetta ein ávaring um, hvat kann henda einum samfelag, sum vendir Guðs orði bakið. Alt gott um hetta.

Nú kenna vit eisini frásøguna um Lot, men tá vit lesa hesa frásøgn, so er tað nakrar heilt aðrar støður, ið vit øtast um, og hetta eru støður, sum vanliga ikki verða viðgjørdar, og tí halda vit, at vit eiga at draga hesar støður fram.

Tað fyrsta, sum vit leggja merki til er hetta, at Lot – ein gudsrøkin og rættlatin maður – er sinnaður at geva døtur sínar til allar mennirnar í býnum, so at hesir kunnu hópneyðtaka tær (1. Mós 19:8). Fyri okkum er hetta ein heldur løgin kærleiki at hava til síni børn. Ikki tí, hesin 'faðirkærleiki' er onki eindømi í bíbluni. Í Dómarabókini kapitul 19 lesa vit um ein annan pápa – eisini gudsrøkin og rættlatin – sum fær vitjan av einum fremmandum manni og hjákonu hansara. Hesin pápin himprast heldur ikki við, at geva dóttur sína til øll mannfólkini, so hesir kunnu hópneyðtaka hana. Dótturin slapp tó undan, men hjákonan bleiv neyðtikin alla náttina og seinni skorin í 12 stykkir.

Tað næsta, sum vit leggja merkis til, í frásøgnini um Lot, er eitt annað dømi um hendan serliga 'kærleika' millum Lot og hansara døtrar. Tað er tá døtrar Lots gera av, at tær vilja hava samlegu við pápa sínum fyri at gerast við barn. Tær realisera sína ætlan og gerast av sonnum eisini við barn – við sínum egna pápa. Hvat sigur bíblian til allan hendan ólevnað? Ikki eitt orð. Ongin fordøming av hesum. Tað einasta, sum skrivað verður um Lot er, at "… Lot var ein rættvísur maður" (2. Pæt 2:7).

Jenis skrivar eisini "Frásøgnina um Sodoma og Gomorra boðar ein Gud, sum gjølla fylgir við Skaparverki sínum. Nágreiniliga visti Hann, hvat fyriførst í býnum báðum - og tað píndi Hann". Hetta passar ikki, og Jenis veitir sjálvur tað skriftstað, sum mótsigur hansara útsøgn. " røpið um Sodoma og Gomorra, tað er stórt, og synd teirra er ógvuliga svár. Eg fari tí nú niður at vita, um tað er so, at tey hava borið seg so illa at, sum tað ljóðar, eftir rópinum, ið komið er til Mín, ella ikki - Eg vil hava tað at vita!" (1. Mós 18:20-21). Ella v.ø.o. "Eg havi hoyrt nógv ræðuligt um hesar býir, men nú eri eg also noyddur at koma niður og sjálvur kanna, um tað veruliga er so". Vildi ein alvitandi gud havt fyri neyðini at kanna tílíkt?

Hetta er so tað, sum vit eisini fáa burturúr við at lesa frásøguna um Lot. Onnur, ið lesa hesa frásøgn, leggja bara dent á søguna um, at tey homoseksuellu vóru oydd vegna sín – í Guds eygum – ótespiliga livihátt. Lot og hansara ótespiliga atferð verður tagd í hel. Tað virkar fyri okkum, sum man tilvitað velur tær frásøgnir burturúr bíbliuni, sum einum sjálvum dámar, meðan man letur restina liggja. Tað er frásøgan um Lot og tey homosexuellu, sum skal forteljast; tann VERULIGA søgan um Lot verður fjald.

Um vit kenna Jenis rætt so skrivar hann hetta fyri at vísa á, at vit føroyingar ikki eiga at viðtaka lógir sum loyva hesum ólevnaði. Vit eiga ikki so mikið sum at viðtaka lógir, ið gera tað ólógligt at speireka og diskriminera hesar minnilutabólkar. Bíblian er jú greið í síni niðurstøðu hesum viðvíkjandi. Tað er tó soleiðis, at bíblian eisini er reiðuliga greið í nógvum øðrum viðurskiftum. Viðurskifti, sum eins og tann veruliga søgan um Lot, ikki altíð vera søgd frá ella havd á lofti. Vit hava í øðrum lesarabrøvum víst á, at tað longu nú finnast nógvar lógir í føroyska lóggávuni, sum als ikki samsvara við bíbliunnar orð. Dømini vóru m.a. um neyðtøku (5. Mós 22:28-29) og trælahald (3. Mós 25:44). Vit fingu tó aldrin eitt svar uppá, hví (kristnir) politikarar í Føroyum ikki stríðast sum úlvar á skóg fyri at broyta lógirnar soleiðis, at tað ikki bara er í spurninginum um tey samkyndu, at okkara lógir eru í samsvar við bíbliuna. Kanska Jenis er maður fyri at geva okkum eitt svar?!?

# Útlendingaøkið enn eina ferð

## Svar til »ein føroying, sum skammast«

**Helgi Abrahamsen**



Ein ið nevnir seg við dulnevninum "Ein føroyingur, sum skammast" skrivar í Dimmalætting 27. desember, at hann hevur lisið eina blaðgrein, har eg skal hava sagt, at útlendingalógin er góð, tí hon er donsk. Víðari sigur hann, at sambandsmenn vilja ikki, at lógin verður føroysk, tí "tað er ikki teirra politikkur, at vit skulu hava nakað at siga í okkara egna landi".

Eg ætli mær ikki í blaðkjak við dulnevndar persónar, men eg haldi, at hesin føroyingurin sum sigur seg skammast, átti at skammast uppaftur meira, eftir at hava skrivað hasa greinina.

**Føroysk ella donsk lóg**
Eg havi ikki sagt, at allar lógir eru góðar, bara tær eru danskar. Tað hevði verið tápuligt av mær at pástaðið nakað tílíkt. Hinvegin, so er tað líka tápuligt at pástanda, at allir trupulleikar á útlendingaøkinum fara at rætta seg av sær sjálvum, um lógin verður føroysk. Spurningurin er ikki um lógarteksturin er skrivaður á føroyskum ella á donskum, so einfalt er málið ikki.

**Tað sum eg segði**
Eg vísti á í umrøddu greinini, at donsku myndugleikarnir hava fyri langari tíð síðani boðað Innlendismálaráðnum frá, at teir eru til reiðar at broyta lógina, um ynski kemur úr Føroyum um hetta, men mær vitandi, er framvegis einki ynski farið avstað úr Føroyum hesum viðvíkjandi. Eg vísti somuleiðis á, at trupulleikin kann ikki hava ligið í teirri donsku lógini, tí Jógvan við Keldu pástendur, at meðan hann sat í Tinganesi ruddaði hann upp í málinum, og tað ber ikki til at rudda í Tinganesi, um óruddið liggur í Keypmannahavn. Eisini vísti eg á andsøgnina í at siga, at trupulleikin er, at Innlendismálaráðið er undirmannað, og so ætlar man at loysa trupulleikan við at yvirtaka málsøkið (tað vil siga, at Innlendismálaráðið skal fáa uppaftur meira at gera).

Hetta var í stuttum tað, sum eg segði í greinini, og tað er óneyðugt hjá øðrum at leggja mær onnur orð í munnin.

**Sjálvandi kunnu allar lógir broytast**
Hesin "føroyingurin sum skammast" skrivar, at danska lógin er góð fyri danir, men at hon hóskar ikki til okkara viðurskifti, og so sigur hann: "so tað mátti borið til at broytt hana, so hon kundi verið nýtt her eisini". Her eri eg púra samdur! Hetta var júst tað, sum eg royndi at vísa á í greinini, og tað er gleðiligt at síggja, at í hvussu so er onkur hevur skilt boðskapin. Sjálvandi kann lógin broytast, eisini uttan at málsøkið verður yvirtikið.

**Nakrir spurningar**
Eg fari til seinast at spyrja "føroyingin sum skammast", hvat hann byggir pástandin á, tá hann sigur, at tað er Sambandsfloksins politikkur, at vit skulu einki hava at siga í okkara egna landi? Hevur hann ongantíð hoyrt um Heimastýrislógina? Veit hann ikki, at henda lógin, sum Sambandsflokkurin av fullum huga tekur undir við, gevur føroyingum víðar heimildir at stýra landinum? Veit hann ikki, at vit hava eitt løgting og eitt landsstýri í Føroyum, hvørs heimildir eru grundaðar á hesa lógina? Hevur hann ikki hoyrt um Nýskipanaruppskot Sambandsfloksins, sum er grundarlagið undir nýggju yvirtøkulógini og uttanríkispolitisku heimildarlógini?

Hví verða slíkir leysir pástandir í heilum slongdir út til almenningin, meðan tey sum koma við teimum krógva seg aftanfyri dulnevnd lesarabrøv? Hví ikki heldur vísa seg sum ein mann, og standa við síni orð?